# VEÐRIÐ Í VESTMANNA



# FEBRUAR 2023

# VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Vestmanna ... 3
Veðrið í bygdini ... 4
Norðan ... 6
Landnyrðingur norðan ... 7
Landnyrðingur ... 7
Landnyrðingur eystan ... 8
Eystan ... 8
Landsynningur eystan ... 9
Landsynningur – **leygardagssól?** ... 9
Landsynningur sunnan ... 10
Sunnan ... 10
Útsynningur sunnan ... 11
Útsynningur ... 11
Útsynningur vestan ... 11
Vestan ... 12
Útnyrðingur vestan ... 12
Útnyrðingur ... 13
Útnyrðingur norðan ... 13
Spurningar og svar ... **Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

**Dagfesting**: 1. februar & 15. februar 2023

**Staður**: Miðhøllin í Vestmanna skúla

**Heimildarfólk:** Kristen Friis,– saman við Bjarka Skúvadal, Niels Petersen

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

# Vestmanna

Vestmanna er bygd á Streymoy, nakað norðan fyri miðjuna á vestursíðuni.

Bygdin er bygd kring ein fjørð/vík, sum í útsynning gongur út í Vestmannasund. Sundið er í miðal 1,5 km breitt. Vestarumegin sundið er Vágar. Kring bygdina eru miðalhøg fjøll.

Byrjandi vestureftir er Hægstafjall (295m), í útnyrðing er Melin (291m), í norðan Reynið (345m), í landnyrðing Loysingarfjall (635m), í eystan Eiðið (332m) og í landsynning Høgareyn (353m).




Mynd 1: Kort av Streymoy. Vestmanna er á vestursíðuni, norðan fyri miðjuna. Fjørðurin úr Vestmannasundi gongur norður og suður, men innast eystur og vestur.



Mynd 2: *Vestmanna avmyndað í norðan. Fjallið vinstrumegin er Hægstafjall (295m). Fjallið miðskeiðis á myndini oman fyri tey ovastu húsini er Melin (291m). Loysingarfjall (635) sæst er uttast til høgru. Fjøll, sum ikki síggjast á myndini og sum ávirka veðrið í bygdini, eru tey eystanfyri. Fjøllini verja ímóti lotinumm, tá ið vindurin ikki er nógvur, men kunnu gera harðar hvirlvur, tá ið nakað av vindi er. Landnyrðingur er besta ætt í Vestmanna, Loysingarfjall verjir fyri lotinum. Um veturin landsynningur tann ringasta ættin. Vindurin kemur tá oman av fjøllunum oman fyri Válin og niðan á Tindin (537m).*

# Veðrið í bygdini

Yvirhøvur er Vestmanna eitt gott veðurpláss, samanborið við aðrar bygdir í Føroyum. Fjøllini kring bygdina verja væl, og leiðin út í Vestmannasund er lutfalsliga smøl.

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í bygdini í Vestmanna, hevur undirritaði fingið samband við Kristen Friis (**KF**), formann í Bátafelagnum í Vestmanna. **KF** hevur sett seg í samband við 20 av limunum felagnum og øðrum.

Teir 14 eru:

- Bjarki Skúvadal, fráfarin skúlalærari og skipsførari
- Niels Petersen, óðalsbóndi, maskinmeistari og elektrikkari
- Jógvan í Dávastovu, skipsførari
- Holgar Nielsen, maskinmaður
- Jóan Hendrik Isaksen, sjómaður og bussførari
- Martin Vilhelmsen, maskinmaður
- Hans Poulsen, smiðjumaður
- Borgar Nicolajsen, maskinmaður
- Eivind Olsen, maskinmaður
- Olav A. Olsen, Fráfarin bedingsmeistari
- Rógvi Nielsen, maskinmaður
- Óli Jákup Hansen, timburmaður
- Sámal Durhuus, fráfarin bankamaður
- Leivur Olsen, fráfarin havnafúti og bóndi
- Óli Klein Olsen, fráfarin asfaltmaður
- Helgi Finn Poulsen, Maskinmaður og elektrikkari
- Marner Seloy, timburmaður
- Helgi Fossdal, skipari
- Kristen Friis, skipari
- Sofus Johannesen, maskinmeistari
- Petur Joensen, timburmaður
- John Martin Andreasen, maskinmeistari
- Dánjal Jákup Andreasen, stjóri

- Magni Blástein, ferðavinnumaður

Við til samrøðuna í miðhøllini í skúlanum í Vestmanna hevði eg spurnarblað til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdin:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar. Nógvar av millumættunum hava sama veður við sær, sum heil- ella hálvættin beint við.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 3: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan kemur beint omanav. Tá er púra stilt inni í Fitjum – yvirhøvur merkist ættin eitt sindur ójavnt kring bygdina. Tó sum heild er ættin góð.

Á ættini er vindurin javnur. Ovarlaga í bygdini – t.e. upp i Miðalsbrekku – hoyrist meira til vindin enn niðri í bygdini.



*Figure 4 Myndin tikin av* Egilsnesi *í norðan. Úr bygdini og norðureftir eru fleiri høg fjøll. Har verður luftin tvungin uppum, guvan fer úr – so er skýgerð og avfall, ið røkkur til bygdina. Inni á Fjørð kann vera turt. Fjøllini verja fyri vindinum, og taka eitt sindur av ferðini. Tað sæst, at hann er beinur norðan, tá ið tað er stilli undir Seglhúsinum, sum er inni á Fitjum.*

Tá ið tað er norðan, er vindferðin sum heild minni enn miðal fyri landið.

Norðan er ein vát ætt í Vestmanna – norðan grætur altíð, men er ikki ein mjørkaætt.

Gjøgnumgangandi er ættin góð.

## Landnyrðingur norðan

Veðrið á landnyrðingi norði líkist nógv veðrinum á landnyrðingi. Hann grætur ikki á ættini.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur er besta ætt í Vestmanna.

Vindurin er javnur, og tað er nógv minni vindur í Vestmanna, enn miðalvindurin fyri landið.



*Mynd 5: Myndin tikin oman fyri Gerðið, úti á Torvheyggi í landnyrðing. Hetta er besta ættin í Vestmanna. Luftin er komin yvir tey høgu fjøllini í Norðureysturoy og Norðurstreymoy, áðrenn hon her kemur oman av Loysingarfjalli (634m). Hetta gevur bæði góða verju fyri vind og letur eisini skýggj og regn hanga eftir í fjøllunum ímóti ættini.*

Ættin er ikki vát, men turr – besta terraættin í bygdini.

Landnyrðingur er ikki mjørkaætt.

## Landnyrðingur eystan

Veðrið á landnyrðingi eystri líkist veðrinum á eystri.

## Eystan

Tá ið hann liggur av eystri, er javnur vindur í Vestmanna. Vindur er meiri enn miðal fyri landið. Tá ið tað er sólskin, er stilt tíðliga um morgunin, og tað stilnar út á kvøldið.

Tá ið skadda liggur inn í Barm, kann vera nógvur kaldur vindur í Vestmanna og toka í Havn. Sólskin í bygdini.



*Mynd 6 Myndin tikin av Hægstafjalli (295m) í ein eystan. Lítil verja av fjøllum beint eystan fyri bygdina, tí er vindurin javnur. Longri eystri í bæði Streymoy og Eysturoy eru miðalhøg og høg fjøll, sum taka vætuna úr luftini, so avfallið er aðrasteðs.*

Eystan er ikki ein vát ætt og ikki mjørkaætt.

Besta terraætt á Rógvu.

Ættin er góð summarætt.

## Landsynningur eystan

Veðrið á landsynningi eystri er stórt sæð tað sama sum á eystri. Er nógvur vindur, eru hvirlur á øllum eysturættunum.

## Landsynningur

Tá ið ættin er landsynningur, er vindur ójavnur. Hvirlur eru inni á Fjørð, tó ikki so nógv sum á landsynningi suðuri.

Vindurin er yvirhøvur meiri enn miðalvindurin fyri landið, og hann er ójavnur í bygdini.



*Figure 7 Myndin tikin av Miðalsbrekku ímóti landsynningi. Luftin fer upp um miðalhøg fjøll, áðrenn hon er í bygdini. Vindurin er ójavnur – inni á Fjørð eru hvirlur. Vindferðin er eitt sindur meiri enn hon er fyri alt landið. Kann vera vátt á ættini. Besta summarætt, men ein tann ringasta um veturin. Runar undir gassá, er ikki farandi inn í holurnar undir Vestmannabjørgunum.*

Landsynningur kann vera vátur, men er ikki mjørkaætt.

Landsynningur er ein tann ringasta ættin um veturin; besta ætt um summarið.

## Landsynningur sunnan

Ættin er hvirluætt inni á Fjørð – skaðaætt. Ikki nógvar skaðaættir eru í Vestmanna, men flestu skaðar eru á hesari ættini. Hvirlurnar koma úr øllum ættum.

Er sagt frá vindi av landsynningi suðuri, er meira vindur í Vestmanna, enn miðalvindurin er fyri landið.

Tað kann regna heilt illa á landsynningi suðuri, og ættin er ikki mjørkaætt.

Landsynningur sunnan er ring ætt í illveðri – annars ikki. Ringast er hon uttarlaga og ovarlaga í bygdini.

## Sunnan

Tá ið ættin er sunnan, er vindurin javnur. Tað er púra stilt á Válinum. Besta ætt inni á Fjørð.

Í lítlum vindi er minni vindur á suðurættini í Vestmanna enn í miðalvindinum kring landið. Er nógvur vindur, er nógvur baksláttur.

Hann drepur uppi frá Nesinum inn á Vál og uppi í Fjalli.

Ættin er vanliga vát, men er ikki mjørkaætt.

Sunnan er ring ætt í nógvum vindi. Er lítil vindur kring landið, er ættin góð í Vestmanna.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er ein keðilig ætt í Vestmanna. Líkist útsynningi, tað er ikki tann stóri munurin.

## Útsynningur

Er ættin útsynningur, er vindurin sum heild javnur, tó hvirlur í støðum.

Vindferðin er nakað tað sama sum miðalvindferðin kring landið.



*Mynd 8 Myndin tikin í útsynning. Er nógvur vindur á útsynningi, eru harðligar hvirlur uttarlaga á vestursíðuni á bygdini – úti í Gerðinum og á Rógvu. Er vindferðin meiri enn 25 m/s, eru harðligar hvirlur út í Gerðinum, er vindferðin minni enn 25 m/s, er mestsum still. Er vindferðin meiri enn 22 m/s, eru harðligar hvirlur úti á Rógvu, er vindferðin minni enn 22 m/s, er mestsum still.*

Útsynningur er ein vát og keðilig ætt og eisini mjørkaætt.

Yvirhøvur er ættin ein miðalgóð ætt. Hon er ymisk kring bygdina. Góð úti á Sundinum.

## Útsynningur vestan

Veðrið á útsynningi vestri líkist veðrinum á útsynningi, lítil munur.

## Vestan

Er ættin vestan, er javnur vindur fyri tað mesta í Vestmanna. Er tó ikki líka javnur allastaðni í bygdini. Hann er javnur inn á Fjørð. Bygningarnir niðri á havnalagnum hava broytt ættin niðalaga. Harðligur inni á Leiti.

Tað kann vera nógvur vindur á hesari ættini uttarlaga í bygdini.

Vestan roynist yvirhøvur væl út á dagin. Kann vera vátt og vindur á morgni, men veðrið roynist væl út á dagin.



*Mynd 9: Myndin tikin av Lágafjalli (650m) ímóti vestri. Vindurin má upp um Grimstaðfjall (450m), ið er norðast á Vágoynni, áðrenn hann aftur skal upp um Hægstafjall (295m). Hetta verjir væl ímóti lotinum, tá ið lítil vindur er. Er nógvur vindur, kann hann vera ójavnur í støðum – serliga uttarlaga í bygdini.*

Ættin er vát, tað regnar ofta illa á vestri. Tá ið gruggið var komið út á hálva havnina (*vánna*), sleit í. Avfallið fylgir ofta sjóvarfallinum. Tað er turrari á eystfallinum.

Niðri í bygdini er sjálvdan mjørki. Tey ovastu húsini í Miðalsbrekku kunnu vera burtur á vestri.

Ættin er ikki ein góð ætt, tá ið tað er nógvur vindur.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið á útnyrðingi vestri líkist veðrinum á vestri.

## Útnyrðingur

Tá ið ættin er útnyrðingur, er ójavnur vindur í bygdini. Tað kunnu vera harðar hvirlur. Ovarlaga og uttarlaga í bygdini er útnyrðingur harðligur. Inni á Fjørð eru ikki so nógvar hvirlur.

Eisini kann vera rennisjógvur, sum ger tað trupult at liggja við bryggju í Vestmanna.

Á útnyrðingi er vindurin meiri ovarlaga í bygdini enn sagt er fyri landið. Niðri í bygdini er minni vindur.



*Figure 10 Myndin tikin av Kráargili í útnyrðing. Áðrenn luftin skal upp um Melin (291m), er hon farin upp umhægri fjøll longri-burtur frá bygdini. Tey bæði gera vindin ójavnan niðri í bygdini við hørðum hvirlum og meiri vindi enn miðal fyri landið, og eisini skýgerð og avfall. Sjórok er í ringum veðri kring alla bygdina.*

Tað regnar vanliga á útnyrðingi – hann grætur. Tað kann eisini vera sjórok í ringum veðri. Tað kann svíða alt av, gras og bløð. Jarnklædningur rustar ímóti ættini. Hetta er ring terraætt.

Á útnyrðingi kann mjørki vera ovarlaga í Miðalsbrekku og á vestursíðuni sum heild.

Ættin er ikki roknað sum ein góð ætt í Vestmanna, kann vera øgilig Uppi í Vestri og á Rógvu.

Útnyrðingurin hevur vanliga morgungron, men hann blíðkast út á dagin.

## Útnyrðingur norðan

Veðrið á útnyrðingi norði líkist veðrinum á norði.